# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Generalarnir í Burma eiga ongan góðan, og tí eiga teir at lata teir røttu leiðararnar fáa valdið*

*(Laura Bush)*

# Aftur skot í skúla í USA



*Ein skelkaður næmingur uttan fyri Success Tech High School í Cleveland*

**14 ára gamli drongurin, sum særdi tveir næmingar og tvey vaksin fólk í einum skúla í Cleveland, skuldi hevna, at hann var vístur úr skúlanum**

Tilburðurin á Success Tech High School í Cleveland í statinum Ohio var annar tilburðurin av sínum slagi í USA higartil í ár. Hin var sorgarleikurin á Virginia Tech í vár.

Hesaferð var gerningsmaðurin bara 14 ár, og hann valdi at taka lívið av sær, áðrenn løgreglan fekk fatur á honum. Hann hevði tvær skammbyrsur, eina í hvørjari hond, og hann hevði latið seg í svørt klæðir.

- Eg møtti honum inni á dreingjavesinum nakrar minuttir frammanundan. Har løddi hann skammbyrsurnar og lat seg í svørt klæðir, sigur tann 15 ára gamli Rasheem Smith við tíðindastovuna AP. Ein annar næmingur, tann 15 ára gamli Ronnell Jackson, møtti byrsumanninum á gongini.

- Hann siktaði eftir mær, men eg slapp út í síðstu løtu, sigur Ronnell við eitt blað í Cleveland.

Aðrir næmingar siga, at tann 14 ára gamli hevði hótt fyrr. Eitt nú verður sagt, at hann hótti við at spreingja skúlan í luftina síðsta fríggjadag.

## Biðja Al Gore stilla upp

**Stuðlar hjá fyrrverandi varaforsetanum vilja hava hann at stilla upp til forsetavalið næsta ár**

Í einari stórari lýsing verður Al Gore biðin um at stilla upp til amerikanska forsetavalið næsta heyst.

- Tú sigur, at tú hevur mist hugin til politiskt arbeiði. Ei undur í, at tað kennist so. Men vit vita, at tú elskar land títt framvegis, og nú hevur landið bruk fyri tær. Flokkurin hevur eisini brúk fyri tær. Ja, øll Jørðin hevur brúk fyri tær, skriva stuðlarnir í lýsingini.

Tey, sum hava fyritrikað átakið, siga, at 136.000 fólk hava skrivað undir eina áheitan á Al Gore um at stilla upp.



*Í dag er Sofia Loren 73. Hendan myndin er tikin fyri trimum árum síðani*

# Sofia Loren aftur á løriftið

**Hóast hon er komin væl upp í árini, aftrar Sofia Loren seg ikki fyri at fara aftur til arbeiðis**

Sofia Loren hevur játtað at spæla við í einum filmi, sum skal takast upp í New York næsta ár. Leikstjóri er amerikanarin Rob Marshall.

Filmurin hevur fingið heitið "Níggju", og hugskotið stavar frá tí kenda filminum "8 1/2", sum Federico Fellini gjørdi í 1963.

Tann 73 ára gamla Sofia Loren sigur við italska blaðið Il Messagero, at hóast hon er komin eitt sindur upp í árini, so merkir tað ikki leiklutin, sum hon hevur fingið.

- Eg skal bæði syngja og dansa, sigur hon við blaðið.

## STUTT SAGT

### Laura hvessir pennin

Amerikanska forsetafrúan, Laura Bush, mælti í gjár hernaðarstýrinum í Burma til at leggja frá sær. Í einari grein í blaðnum Wall Street Journal skrivar Laura Bush, at teor burmesisku generalarnir eiga at gevast við áganginum ímóti landsins egna fólki beinanvegin. Hon skrivar, at stýrið hjá Than Shwe, generali eigur ongan góðan. Tí eigur tað at leggja frá sær, so Burma kann sameinast aftur, og soleiðis at teir lógligu leiðararnir sleppa til valdið, skrivar Laura Bush.

### Tað var fólkadráp

Uttanríkisnevndin hjá Umboðsmannatinginum í USA hevur samtykt eina fráboðan, sum staðfestir, at turkisku hópmorðini á armenar undir fyrra heimsbardaga var eitt fólkadráp. Hvítu Húsini høvdu ávarað uttanríkisnevndina ímóti at samtykkja fráboðanina, tí hon kann órógva viðurskiftini við Turkaland. Men nevndin samtykti fráboðanina við 27 atkvøðum fyri og 21 ímóti.

Í árunum frá 1915 til 1917 beindu turkar fyri umleið 1,5 mió. kristnum armenum í Turkalandi.

### Rýma úr Eindarlistanum

Síðani Eindarlistin í Danmark bleiv stovnaður í 1992, hevur limatalið verið veksandi at kalla alla tíðina, men nú gongur tað hinvegin. Sambært Berlingske Tidende halda fleiri, at orsøkin eitur Asmaa Abdel-Hamid. Hon er muslimur og ætlar sær at stilla upp fyri Eindarlistan á næsta fólkatingsvali. Mern tað eru minni enn so allir floksfelagarnir, sum eru so fegnir um hana og hennara sjónarmið. Sambært Berlingaranum hevur Eindarlistin mist umleið 100 limir síðani í mei, tá tað frættist, at Asmaa Abdel-Hamid skuldi stilla upp til flokkin.